gult cyan magenta svart



# Netavirkið byggir út



*Garnavirkið Netamontering á Oyrarbakka byggir út og tvífaldar húsarúmdina*
*Mynd: Edvad Joensen*

**Netamontering á Oyrarbakka byggir út. Hølisviðurskiftini vóru ikki nøktandi, og nú verður plássið umleið tvífaldað**

FISKIREIÐSKAPUR
*Edvard Joensen*

Garnavirkið Netamontering á Oyrarbakka byggir út fyri at betra arbeiðsumstøðurnar til vaksandi eftirspurningin.

Umstøðurnar til at gera gørn til føroysku garnabátarnar vóru vorðnar so mikið truplar, at neyðugt var at byggja virkið út, sigur Eddie Ennigarð á Netamontering

Hann greiðir frá, at Netamontering flutti í hølini hjá Fiskaaling við Streymin fyri umleið fimm-seks árum síðan. Tá arbeiddu fýra fólk á virkinum. Í dag eru tey 10 fólk til arbeiðis. Tey gera gørn til svartkalva- og havtaskuskipini, sum royna undir Føroyum. Eisini hevur virkið gjørt onkran grønlendskan garnabát út seinnu árini.

Men grønlendingar fara nú sjálvir at seyma gørn, og í tí sambandi er stjórin á Netamontering, Hjalgrím Dahl, í Grønlandi og lærir teir at brúka maskinurnar, teir hava keypt.

Netamontering ger gørn til eini sjey-átta føroysk garnaskip, sigur Eddie Ennigarð. Umframt eru so tvey onnur, sum vanliga seyma síni egnu gørn, men eisini av og á fáa gørn frá Netamontering. Tey keypa tó eisini væl av aðrari útgerð frá virkinum á Oyrarbakka, sigur hann.

Hjalgrím Dahl, sum eigur virkið, keypti herfyri hølini, virkið húsaðist í. frá Fiskaaling. Tey vóru ov trong, so farið varð at kalla beinanveg undir at byggja út. Bygt verður upp í suðureftir. Ein bygningur, sum er væl rúmligari enn tann verandi, sigur Eddie Ennigarð.

Í nýggja bygninginum verður seymihøll í niðaru hæddini, meðan tann ovara fer at hýsa matstovu og skrivstovu.

Gamli bygningurin verður nýttur til goymslurúm. Men hann er longu í minna lagi, og gjørdir eru møguleikar fyri at byggja út norður eftir eisini. Sum er verða bingjur, sum standa uttan fyri, nýttar sum goymslurúm.

Umframt garnavirkið er eisini handskavirki í sama bygninginum. Hjalgrím Dahl keypti fyri nøkrum árum síðan maskinurnar frá handskavirkinum á Húsum og setti tær upp við Streymin. Virkið er í gongd soleiðis av og á, sigur Eddie Ennigarð.

Men tað er tó ikki so ofta, tey baka handskar, sum hann nevnir tað. Tí loyvir tíðin ikki, tí so mikið væl er at gera við netamonteringini.

Heldur ikki er tað serliga heppið, at handskavirkið og garnavirkið eru í somu hølum, tí handskaframleiðslan skapar nógvan royk, sum ikki er serliga hugaligur at arbeiða annað arbeiði saman við, sigur hann.





Vilt tú verða ein av okkum

So átti tú at gjørt sum vit. Vit eru í holt við eina spennandi og fjølbroytta útbúgving á Tryggingarfelagnum Føroyum.

Útbúgvingin er ein tvey ára fíggjarútbúgving við sergrein innan trygging. Tú fært hollan kunnleika um tryggingar og lærir m.a. um løgfrøðina aftanfyri tær. Tú arbeiðir eitt skifti í senn á ymiskum deildum. Á henda hátt fært tú innlit í bygnaðin á eini stórari fyritøku við yvir 100 starvsfólkum.

Tann teoretiska førleikan fært tú við at fylgja undirvísing og skriva uppgávur við jøvnum millumbilum. Útbúgvingin gevur tær góðar møguleikar fyri framhaldandi tryggingarútbúgving til eitt nú tryggingarráðgeva ella skaðaviðgera.

Tað er ein treyt, at tú ert studentur, HF'ari, HH'ari ella samsvarandi. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Vilt tú vita meira, kanst tú tosa við Henry Olsen, deildarstjóra, á tel 345509 ella fartel 211715. Ella tú ringir til ein av næmingunum fyri at hoyra, hvat teir halda um útbúgvingina og um Tryggingarfelagið Føroyar sum læarupláss.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 23. apríl. Avrit av prógvum og møguligum viðmælum skulu fylgja við umsóknini, sum skal sendast til:

Tryggingarfelagið Føroyar
starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

Helgi Lamhauge Petersen, 22 ár, úr Rituvík:

"Útbúgvingin er avbjóðandi og spennandi. Eg havi verið á fleiri deildum í felagnum, eitt nú skaðadeildini, privatdeildini og vinnulívsdeildini. Eg havi eisini gingið til undirvísing, skrivað uppgávur og verið til próvtøkur. Eg kundi steðgað eftir tveimum árum, men ætli mær eina hægri útbúgving innan trygging."

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · 110 Tórshavn
Tel 345600 · Fax 345601
tf@trygging.fo · www.trygging.fo

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt sínámillum tryggingarfelag, sum hevur høvuðsdeild í Havn og hevur 5 deildir kring landið. 111 fólk starvast í felagnum. Fyri starvsfólkini ynskja vit at skapa fastar karmar um ymsu arbeiðsøkini, soleiðis at starvsfólkini vita, hvørjar uppgávur tey skulu loysa, og hvat felagið væntar av teimum.




# – Ongin vinnur á aldrinum

**Símun David Kalsø er lættur á fótum, hóast hann er uppilagstur eftir eitt lív sum sjómaður. Í dag verður hann 90 ár**

90 ÁR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Hann hevur siglt meginpartin av lívi sínum, kennir høvini og fiskileiðirnar, men seinnu árini hevur hann verið í landi. Hann gremur seg um, at hann einki ger til nyttu longur.

– Eg passi meg sjálvan, men annars geri eg einki til nyttu, heldur Símun David Kalsø, sum í dag verður 90 ár.

Dagurin verður hildin í heiminum við Stoksoyravegin seinnapartin í dag.

Símun David vaks upp á Húsum, og hann fór at taka eina hond í, so skjótt hann var førur fyri tí.

– Eg havi arbeitt, so leingi eg kann minnast. Tað var altíð okkurt at tríva í tá í tíðini. Pápi mín hevði jørð og kríatúr, og hann var eisini skómakari. Eg var við í nógvum av arbeiðum, frá tí at eg var smádrongur, sigur Símun David.



*90 ára gamli Símun David Kalsø hevur verið sjómaður alt sít lív, og eitt tíðarskeið var hann við Skálaberg, sum hongur innrammaður á vegginum í heiminum.*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

### Við slupp

Símun David fór fyrstu ferð til skips sum 16 ára gamal í 1927. Tá vóru dreingirnir ofta yngri, tá teir fóru burtur fyrstu ferð.

– Eg var ikki so grammur at fara til sjós, men eg helt, at eg kundi ikki blíva við at ganga og mæla á Húsum, minnist Símun David.

Og bíðaði hann eitt sindur longur enn aðrir dreingir við at fara til skips, so mundi hann verða drúgvari enn teir flestu á sjónum. Símun David sigldi til hann var komin langt upp í árini, og hann var skipari nógv ár.

– Mær dámdi altíð líka væl at sigla. Eg havi kent meg væl á sjónum, og tað hava verið nógvir minniligir túrar, sigur hann.

Fyrsti túrurin til skips var við sluppuni Saltoyruni, sum systkinabarnið, Johannes Hansen, førdi. Seinni var Símun David við skiftandi sluppum og skipum.

### Royndi at søkkja skipið

Símun David sigldi øll krígsárini við fiski úr Føroyum til Bretlands. Hann var skipari á Fimm Systrum, sum sigldi til Fleetwood í Onglandi.

– Eg helt tað var best at sigla vestanfyri Ongland, tí á teininum har niður vóru ikki so nógv flogfør, sigur Símun David.

Fleetwood liggur á vesturstrondini í Onglandi, og hóast tað er fittur teinur longur til hendan býin enn til eitt nú Aberdeen, so helt Símun David, at hetta var betra valið.

– Men vit sluppu ikki undan týskinum. Tíðliga í krígnum var eitt flogfar eftir okkum, stutt eftir at vit vóru farnir úr Føroyum. Hann fleyg sera lágt yvir okkum og slepti eini bumbu. Tað var bara eitt Guds undur, at bumban gekk leys av skipinum og fór í havið uttan at spreingjast.

– Hevði bumban sprongst í dekkinum, vóru vit ikki komnir livandi frá hendingini, heldur Símun David.

Sama flogfar, sum royndi at søkkja Fimm Systrar, helt leiðina yvir Havnina og tveitti onkrar bumbur har.

### Vinnur ikki á aldrinum

Hóast kvøkkin frá hesi hendingini, helt Símun David áfram at sigla við fiski til Bretlands øll krígsárini.

– Vit kundu ikki bara allir leggja okkum heima, tí so hevði einki borið til, sigur hann.

Teir fingu maskinbyrsu umborð á Fimm Systrar eftir hendingina við týska flogfarinum, men teir fingu ongantíð brúk fyri henni í aðrir uppgerð við týskara á vengjum.

Eftir kriggið helt Símun David fram við at sigla, og hann var sjómaður til hann kom langt upp í árini.

Nú heldur Símun David, at minnið er farið at bila, og hann heldur, at tað skyldast einum kjøtbita, hann át fyri tveimum árum síðani. Hesin kjøtbitin var ikki í lagi og rakti Símun David sum eitt skot.

– Síðani haldi eg ikki, at eg havi verið tann sami, men ongin hevur vunnið á aldrinum, so hví skuldi eg gjørt tað, sigur hann og flennir.

Símun David giftist við Andreu, og hann hevur tvey børn – Ásu og Daniel. Konan fór fyri fleiri árum síðani.

Símun David eigur seks abbabørn, og fýra teirra búgva í Danmark. Mánadagin kom dóttirin, maður hennara og tey fýra abbabørnini úr Danmark til Klaksvíkar at halda føðingardagin.

# Nógv tilboð uppá eldraíbúðir

**Kostnaðarmetingin fyri arbeiðið at gera eldraíbúðir undir Kráarbrekku í Klaksvík fer at halda**

ÚTBJÓÐING
Eyðun Klakstein

**Klaksvík:** Seinnapartin mánadagin vórðu tilboðini til arbeiðið at gera eldraíbúðir undir Kráarbrekku í Klaksvík latin upp.

Arbeiðið varð boðið út í pørtum fyri at fáa fleiri at bjóða, og tað eydnaðist eisini.

– Vit hava fingið 20 tilboð til tey ymsu arbeiðini, og hóast nógv er at gera í løtuni, halda vit, at tað er kapping um at fáa ymsu arbeiðini. Í hvussu er fer kostnaðarmetingin fyri arbeiðið at halda, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

– Vit halda okkum tó síggja, at feløgini í Norðoyggjum og Eysturoy hava latið lægri tilboð enn feløg í Havn, sigur hann.



*Byggifelagið Kanjon er farið undir at gera sambýlið í eldraøkinum undir Kráabrekku. Í næstum verður farið undir at byggja eldraíbúðirnar.*
*Mynd: Eyðun Klakstein*

### Byrjaðir at gera sambýli

Nú skulu tey ymsu tilboðini kannast væl, áðrenn støða verður tikin til, hvør skal gera tey ymsu arbeiðini. Fleiri av lægstu tilboðunum eru jøvn, og tí er neyðugt at samanbera tey, áðrenn nøkur støða verður tikin.

Arbeiðið at byggja eldraíbúðirnar undir Kráarbrekku skal byrja sum skjótast, og klárt er at fara í gongd, tí grivið er út fyri íbúðunum.

Í eldraøkinum verður eisini eitt sambýlið, og arbeiðið at gera hetta sambýlið er farið í gongd. Tað er Kanjon, sum hevur fingið betongarbeiðið, meðan Jan Nielsen skal gera timburarbeiðið.

Sambýlið skal verða klárt komandi ár, meðan alt eldraøkið skal standa liðugt í 2003.

Stórur áhugi hevur verið millum fólk fyri at fáa eina av íbúðunum undir Kráarbrekku, og Klaksvíkar kommuna hevur fingið eina ørgrynnu av umsøknum til hesar íbúðir.

# Regnið gjørdi aftur ónáðir

**Vegir, gongubreytir og kjallar fingu skaða, tá tað regnaði av grimd í Klaksvík mánakvøldið. Støðan í býnum er verri av, at skaðarnir frá tiltikna glopraregninum í fjør ikki eru gjørdir aftur enn**

VATNSKAÐAR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Tað vóru fleiri skaðar í Klaksvík av nógva regninum, sum kom niður mánakvøldið.

Onkrir vegir, gongubreytir og kjallarar fingu skaða, og menn frá Klaksvíkar kommunu vóru til arbeiðis mánanáttina fyri at avmarka avleiðingarnar av oysregninum.

– Tað ger ikki støðuna í bý num betri, at skaðarnar frá regninum 18. september í fjør ikki eru afturgjørdir enn. Tað tykist sum tað læattari flýtur yvir nú, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

### Floymdi í kjallarar

Helnabrekka vísir seg at verða útsett, tá nógv regn er, og aftur hesaferð skolaði partur av gongubreyt og vegi burtur. Hetta var eitt økið, sum var hart rakt í fjør.

Eisini á Traðargøtu fleyt yvir, og vatnið streymaði oman á Víkavegin. Her hevur ein brekka og onkur kjallari fingið vatnskaða.

– Vit hava fingið fleiri fráboðanir um, at vatn er floymt inn í kjallarar og at vegir og gongubreytir hava fingið skaða. Í morgun eru menn farnir at rudda eftir regnið, segði Steinbjørn Jacobsen fyrrapartin í gjár. Klaksvíkar kommuna hevur roynt at bøta um skaðarnar eftir rengið í september í fjør, men hetta eru umvælingar fyri nógvar milliónir.

Kommunan hevur søkt landsstýrið um fíggjarligan stuðul til umvælingar, men hevur einki svar fingið enn.